**UTTAN ÚR HEIMI**

## Stjala frá sjúkrahúsum

Sera nærlagdir tjóvar hava seinastu árini stolið útgerð frá donskum sjúkrahúsum, tannlæknastovum og fyritøkum, sum gera útgerð til heilsuverkið. Talan er um stuldur fyri nógvar milliónir krónur.

Danska løgreglan sigur, at tjóvarnir gerast snildari og snildari, og alt bendir eisini á, at teir vita, hvat teir skulu taka. Eisini hevur tað víst seg, at tjóvarnir í fleiri førum hava stolið útgerð, beint eftir at hon er sett upp á sjúkrahúsunum, og tað hevur fingið løgregluna at halda, at tjóvarnir eru sera væl vitandi um, hvat hendir á teimum einstøku sjúkrahúsunum.

Hildið verður, at tjóvagóðsið verður flutt av landinum, og at tað verður selt á privata marknaðinum í teimum eysturevropeisku londunum.

## Prísurin órógvar

Fleiri leiðandi limir í amerikansku kongressini eru ørkymlaðir av teimum ovurstóru útreiðslunum av krígnum í Irak, og teir ivast í, um stjórnin í Washington rekur tann rætta politikkin.

Fíggjarstjórin í Hvítu Húsunum, Joshua Bolton, kunnaði týsdagin senatið um útreiðslurnar av krígnum, og hann segði seg vænta, at arbeiðið at endurreisa landið fer at kosta góðar 50 milliardir krónur í ár. Fyrr hava talsmenn hjá verjumálaráðnum Pentagon sagt, at tað kostar USA góðar 27 milliardir krónur um mánaðin at hava herfólk og útgerð í Irak.

Uttanríkisnevndin hjá senatinum hevur fyrr sagt, at hon vil hava tey sameindu hjá USA at átaka sær ein part av útreiðslunum av krígnum, men fleiri lond hava svarað, at tey fara ikki at átaka sær nakað uttan so, at ST fær høvuðsábyrgdina av tí, sum skal henda í Irak.

## Doyði av hitaslagi

Ein týsk kvinna, sum varð burturflutt saman við fleiri øðrum evropeiskum ferðafólkum í Algeria í vár, doyði um vikuskiftið av hitaslagi. Tað hevur verið ógvuliga heitt í algerisku oyðimørkini seinastu tíðina, og hitin hevur javnan verið uppi á 50 stigum.

Týska kvinnan varð burturflutt síðst í februar saman við 14 øðrum evropeiskum ferðafólkum. Um somu tíð vórðu 17 aðrir útlendingar burturfluttir í Algeria, men tað eydnaðist at fáa teir leysar, tá algeriskir stjórnarhermenn komu fram á burturflytarnar og gíslarnar síðst í mai.

Síðani hava myndugleikarnir roynt at fáa hinar gíslarnar leysar, men higartil til fánýtis. Í seinastuni hevur tað ljóðað, at gíslarnir vóru fluttir til grannalandið Mali, og týskir, niðurlendskir og sveitsiskir løgreglumenn eru nú farnir hagar at hjálpa myndugleikunum at leita eftir teimum.

## Tíðindafólk sita fangar

Altjóða nevndin, sum tekur sær av trygdini hjá tíðindafólki, vil vera við, at amerikanska hervaldið í Irak hevur havt tveir iranskar tíðindamenn sitandi í varðhaldi síðani 1. juli.

Teir báðir tíðindamenninir arbeiddu hjá einari iranskari sjónvarpsstøð, tá amerikanskir hermenn tóku teir har suðuri í Irak. Altjóða nevndin hevur nú sent amerikanska umsitingarleiðaranum í Irak, Paul Bremer, eitt mótmæli við kravi um, at teir báðir tíðindamenninir sleppa úr varðhaldinum alt fyri eitt. ST er eisini kunnað um málið.

Altjóða trygdarnevndin sigur seg hava fingið fleiri kærur um framferðina hjá amerikanska hervaldinum í Irak. Eitt nú bukaðu amerikanskir hermenn ein japanskan myndamann, tí hann hevði tikið myndir av einum amerikonskum álopi, og í einum øðrum føri fingu fýra turkiskir tíðindamenn somu viðferð.

# Sharon ikki til at vika



*Bush vildi hava Sharon at steðga arbeiðinum at byggja múrin millum Ísrael og Vestara Áarbakka, men Sharon var ikki til at vika*

*Mynd: Reuter*

**Tað eydnaðist ikki amerikanska forsetanum at fáa ísraelska forsætisráðharran at steðga arbeiðinum at byggja ein múr millum Ísrael og Vestara Áarbakka.**

ÍSRAEL
*Árni Joensen*

Tann umstríddi múrurin var eitt av evnunum, tá George W. Bush og Ariel Sharon hittust í Washington fyrr í vikuni. Tá palestinski forsætisráðharrin, Mahmoud Abbas, var í USA í síðstu viku, tosaði Bush um múrin, men eftir fundin við Sharon hevði avbyrgingin fingið heitið girðing.

Tað er greitt, at Bush bað Sharon steðga byggingini, men á tíðindafundinum í Washington gjørdi Sharon greitt, at hann letur seg ikki vika í hesum málinum.

– Eg havi sagt, at vit fara at halda fram við at byggja girðingina. Men eg ætli mær at skipa so fyri, at girðingin verður til so lítlan ampa fyri palestinar sum gjørligt, segði Sharon.

Palestinararnir hava hvassliga fordømt ísraelsku avgerðina at byggja ein múr millum Ísrael og Vestara Áarbakka. Teir siga, at múrurin fer at elva til spjaðing, og at hann tænir ikki royndunum at fáa varandi frið í lag millum Ísrael og palestinar.

# Saudiarabia í øðini inn á Hvítu Húsini

**– Einki minni enn ein gøla, sigur saudiarábiski uttanríkisráðharrin um avgerðina hjá Hvítu Húsunum at fjala tann partin í einari kongressfrágreiðing, sum leggur Saudiarábia undir at hava verið uppi í atsóknini 11. september í 2001**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

Saudiarábiska stjórnin er í øðini. Fyrst vildi ein kanningarnevnd hjá amerikonsku kongressini vera við, at Saudiarábia hevði ein virknan lut í tí, sum hendi upp undir yvirgangsatsóknina 11. september í 2001, og tá saudiarábiska stjórnin bað um at sleppa at síggja hetta brotið í frágreiðingini, søgdu Hvítu Húsini nei. Heldur ikki ein persónlig áheitan frá Abdullah, krúnprinsi, hjálpti.

– Ein gøla. Skuldsetingin ímóti Saudiarábia byggir á villleiðandi upplýsingar og stavar frá óndsinnaðum gitingum, sigur saudiarábiski uttanríkisráðharrin, Saud Feisal, prinsur. Við Washington Post sigur hann, at Saudiarábia hevur einki at fjala, og landið hevur heldur ongan áhuga í, at Hvítu Húsini fjala tær 28 síðurnar, sum vórðu tiknar úr frágreiðingini, áðrenn hon varð kunngjørd.

Í frágreiðingini kemur millum annað fram, at yvirgangsmenninir fingu fíggjarligan stuðul frá einstøkum limum í saudiarábisku stjórnini. 15 av teimum 19 monnunum, sum vóru við í atsóknunum, vóru saudiarábar.

# Fuglaljóð frá Blak




**Fløga er komin út, ið útgevarin nevnir eina ljóðfløgu. Talan er um fuglaljóð og sonevndan instalatiónstónleik**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Kristian Blak hevur givið út nýtt verk á fløgu. Hesaferð er talan um verk úr fuglaljóðum og nevnist verkið Aviphonie (avis merkir fuglur og phonie merkir ljóð).

– Her eru fuglaljóð og eg havi arbeitt við hesum sum element. Verkið er í fimm pørtum og mest eru tað fuglaljóð, men eisini brim og áartutl, sigur Kristian Blak.

Slíka tónlist hevur Kristian Blak áður fingist við og tað eru eini 20 ár síðani, at hann byrjaði uppá tað.

– Ein útgáva við tónleiki er gjørd, men á nýggju útgávuni er einki menniskjaljóð við, sigur Blak.

**Tróndur er upprunin**

Upprunin er, at Tróndur Patursson bílegði tónleik, ið skal nýtast, tá glashús hansara verður sett upp á Norðuratlantsbryggjuni seinni í ár. Har kemur nýggja verkið at ljóma og Kristian Blak sigur, at talan er um instalatiónstónleik, sum er givin út á fløgu.

Karsten Hansen, Kartni Fornagarð og Jón Heðin Tróndheim hava staðið fyri tøkni og afturat teimum hevur Jóhannus á Rógvu Joensen verið við við ljómpultin.

Upptøkurnar eru gjørdar í Mykinesi í 2000 og 2001 Í fløguhúsanum eru fuglarnir nevndir, ið eru at hoyra. Permumyndin er gomul list eftir Díðrikki á Skarvanesi (1802-1865). Verkið er býtt í 5 partar, Eystur, Vestur, Veingir, Suður og Norður.

Tutl gevur út og hevur eisini aðrar nýggjar fløgur á gáttini, t.d. hevur Sámal Petersen spælt inn soloviolin og Kristian Blak gevur út eina klassiska kvartett.

# Suni vendur ikki tí niður ið vendur upp

**Hóast hann ikki er maðurin, ið ger nógv burturúr sær sjálvum, so hevur hann gjørt eitt sindur um seg millum ár og dag, serliga sum táttayrkjari, men Suni F. Jacobsen hevur í hálva øld fingist við málningalist og nú verður høvi at síggja hansara listaverk**

LIST
*Dagfinn Olsen*

Framsýning er í Gallarí Fríðriksvág í Vágsbotni. Hóast framsýnarin hevur málað í mong ár, so hava verk hansara ikki verið at sæð ofta.

Suni F. Jacobsen er kendur sum táttayrkjari og eigur hann mangan kendan V4 tátt og manga landaplágu. Gøtumaðurin starvaðist nógv ár í Tinganesi, men fór frá fyri nøkrum árum síðani.

Nú hevur hann eina afturlýtandi framsýning, nú hálv øld er liðin síðani hann var á tí stóru listaframsýningini á Charlottenborg, har hann var ein av teimum fyrstu listamonnunum at umboða Føroyar.

Tað sum vendur niður vendur upp

Ein av kendu landaplágunum hjá Suna Jacobsen sigur, at "tað sum vendur niður vendur upp". Myndirnar hjá Suna eru tó ikki av tí slagnum, har tað ikki ber til at síggja, hvat vendur upp og hvat vendir niður, boða fyrireikararnir frá. Hann dugir sera væl at lýsa vakurleikan í føroysku náttúruni. Vælgerandi er at síggja myndir hansara av húsum og øðrum sporum, ið menn hava sett á land okkara.

Tað merkist at hann hevur arbeitt dúgliga við listini farnu árini, og tað er í tøkum tíma, at hann gevur okkum møguleika at síggja tað, ið hann so lítillátin og stillførur hevur fingist við hesa hálvu øldina.

Framsýningin í Fríðriksvág er opin til tann 9. august og opið er gerandis frá klokkan 16 til 17:30 og leygardag frá klokkan 10:30 til 12:00.

*Suni F. Jacobsen sýnir málningalist í Gallarí Fríðriksvág. Hóast málari í hálva øld, so er hann kendastur sum táttayrkjari og eigur orðini til sangin "..tí at tað sum vendur niður vendur upp", men soleiðis er ikki við málningalist hansara*

